# Jól í Bulgaria

Í Bulgaria verða Jólini nevnd “Koleda”, ella meiri hátíðarliga “Rozhdestvo Hristovo” – Jesu føðing, sum verður hildin 25. desember. Sum er eitt rættuligt frávik samanborið við hini ortodoksu londini, sum halda Jólini hin 6. januar, á Trettanda degi. Eftir bulgarskum siði er Jólaaftan hæddarpunktið í Jólaføstuni, sum er í døgunum áðrenn Jól. Jólaaftan eta bulgarar bara nakrar lættar rættir. Men sjálvar jóladagarnar eta bulgarar gjarna nógv kjøt. Ímillum jólasiðirnar í Bulgaria er tað nonevnda “Koleduvane”, sum fevnir um dreingjasangarar. Hesir syngjandi dreingirnir byrja at vitja húsini í grannalagnum um midnáttarleitið jólaaftan. Við sær hava teir syngjandi dreingirnir góðynski um góða heilsu, ríkdóm og eydnu. Ein serligur siður er, at tey kína rygginum hjá fólki við ein serliga prýddum jólastavi. Sum í so nógvum øðrum londum, so verða húsini nógv prýdd við jólaprýði. Tað ironiska var, at undir kommunistisku tíðini var Frostabbin rættuliga væl lýddur av kommunistiska stýrinum. Tí hann kappaðist við tey kristnu jólini!






















